Nú kanst tú søkja um

# Stuðul til gransking, menning og nýskapan

Í ár eru økini "Mentan", "Náttúra og náttúrutilfeingi" og "Tøkni" raðfest, soleiðis at verkætlanir innan hesi øki hava serligan fyrimun.

**Stuðul verður latin:**
- føroyskum granskarum og granskaralesandi
- gransking, menning og nýskapan á ella í tilknýti til føroyskar granskingarstovnar og vinnufyritøkur
- gransking, menning og nýskapan, ið hava týdning í føroyskum høpi.

**Stuðul verður latin til ymisk sløg av verkætlanum:**
- smærri verkætlanir við styttri tíðarætlan
- post grad. ella post doc. verkætlanir, ið ganga um fleiri ár
- ph.d.-verkætlanir.

**Tað er ein fyrimunur, at:**
- verkætlanin fevnir um samstarv millum fleiri granskarar
- verkætlanin fevnir um samstarv millum granskarar, granskingar-umhvørvi og vinnuna
- umsøkjari fær stuðul aðrastaðni eisini.

Umsóknir skula skrivast á skandinaviskum ella enskum máli á serligt oyðublað, ið fæst á skriv-stovu ráðsins og á heimasíðuni, www.gransking.fo.

Nærri frágreiðing um raðfestu økini og skrivlig vegleiðing fæst á somu støðum.

**Umsóknarfreist er:**
1. september 2006, kl. 12.00

Hugsjón

Vit vilja
- at gransking í Føroyum skal vera á altjóða stigi
- birta upp undir menning og nýskapan
- leggja dent á øki, har vit hava tilfeingi at gera rannsóknir
- at fremsti førleiki og vitan um land og fólk skal finnast í Føroyum

Vit eru sannførd um
- at gransking, menning og nýskapan eru avgerandi liðir í at brynja okkum til avbjóðingarnar í einum heimi í støðugari broyting

Vit ynskja
- dyggari grundarlag fyri avgerðum
- betri tillagingarførleika í altjóðageringini
- betri kunnleika til burðardygga umsiting av náttúrutilfeingi
- størri virði í føroyskari framleiðslu og útflutningi
- hægri vitan og tilvitan um mentan og samfelag

Grundstøðið er
- at grundgransking er neyðug fyri at fáa til vegar vitan til gagn fyri samfelagið
- at nýtt gransking mennir vinnulív og samfelagstænastur
- at samstarv og samskipan eru fyritreytir fyri nyttuvirði av gransking, menning og nýskapan

sansir.fo

**Granskingarráðið hevur tvey høvuðsarbeiðsøki**
- at ráðgeva landsstýri og vinnu í granskingarpolitiskum spurningum.
- at umsita Granskingargrunnin, sum veitir fígging til gransking, menning og nýskapan.

granskingarráðið THE FAROESE RESEARCH COUNCIL

Granskingarráðið · Bryggjubakki 12 · Postrúm 259 · FO-110 Tórshavn
Tel 31 65 15 · Faks 35 31 01 · www.gransking.fo · gransking@gransking.fo






# MÓTTØKA

Føroyaprent bjóðar viðskiftafólki og øðrum áhugaðum til móttøku
fríggjadagin 5. mai 2006, kl. 15 til 18 á Hoyvíksvegi 59

*Á skránni henda dagin er:*

Yrkingasøvnini hjá **Tummas Napoleon Djurhuus** „Men dansurin gongur“, sum **Ingálvur av Reyni** myndprýddi, og „Vísir og tættir“, verða endurprentað og givin hvørjum luttakara.

**Hanus Johansen** syngur yrkingar hjá Tummas N. Djurhuus, sum hann hevur sett løg til.

Kvinnumynd hjá **Torbjørn Olsen** verður prentað sum plakat. Tey, sum koma á móttøkuna, fáa signerað eintak heim við.

Nýggjasta íløgan hjá Føroyaprent, ein maskina sum leggur **UV lakk** á prentlutir verður víst fram.

Ein partur av Føroyaprent hevur røtur aftur til 1877. **Landsbókasavnið** hevur sett upp eina framsýning við bókunum, vit prentaðu tey fyrstu árini.

Ein onnur framsýning er eisini við prentlutum vit í nýggjari tíð hava gjørt.

Meir fæst at vita um móttøkuna við at vitja heimasíðu okkara www.foroyaprent.fo

Pf. Føroyaprent Hoyvíksvegur 59 100 Tórshavn
Tel. 31 45 55 Faks 31 80 26 info@foroyaprent.fo

Føroyaprent